# Kemur ikki upp á tal við studningi til fiskiflotan

**– Fiskiflotin fær ikki studning frá tí almenna, hóast støðan er trupul í løtuni, sigur Bjørn Kalsø, landsstýrismaður**

FISKIFLOTI Í TRONGSTØÐU
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



– Tað kemur ikki upp á tal at lata feskfiskaflotanum studning.

Tað staðfestir Bjørn Kalsø, landsstýrismaður í Fiskivinnumálum.

Í blaðnum í gjár vísti formaðurin í reiðarafelagnum á, hvussu ringari støðu, fiskiflotin undir Føroyum er í av tí, at oljurpísirnir eru so óhoyrt høgir, samstundis sum fiskaprísirnir eru lágir. Serliga er trolaraflotin illa fyri og tá serstakliga lemmatrolararnir.

Jákup Sólstein metti, at hendir ikki ein munagóð broyting beinanvegin, verða tað fleiri bátar, sum koma í svára neyð, longu í heyst.

Og hann skoytti eisini uppí, at hóast støðan var sum hon var, læt tað almenna ikki við seg koma.

*Fiskiflotin fær ongan studning. Men vit vita ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða og heldur hendan støðan fram, er talan um eina nýggja støðu og tað mugu vit taka upp tá*

Og tað hevur hann rætt í, tí landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum letur ikki við seg koma.

Bjørn Kalsø sigur,at feskfiskaflotin undir Føroyum fær ikki stuðul.

Fyrr í ár varð annars samtykt at lata rækjuflotanum stuðul fyrr í ár. Ein orøk til tað var, at oljan er so dýr.

Men rækjuflotin og feskfiskaflotin undir Føroyum kunnu ikki samanberast, sigur landsstýrismaðurin.

– Orsøkin til at rækjutrolarin fekkstuðul var ein roynd at hjálpa honum at hóraundan fyri at varðveita Føroyum nøkur fiskirættindi, sum vit hava aðrastaðni, uttan at betala afturfyri við fiski undan Føroyum.

Bjørn Kalsø ásannar, at tað hevur altíð gingið upp og niður við fiskiskapinum og tað eru altíð skip, sum ikki hava klárað tað. Tað er bara at vóna, at gongdin vendir aftur skjótt.

Hann vísir eisini á, at flotin hevur havt nøkur sera góð ár og hann vónar, at reiðar hava lagt so mikið til síðis at standa ímóti við, at tey eisini klára eitt nos nú. Men landsstýrismaðurin letur ikki allar dyr aftur, tí upp á fyrispurningin um, hvat hendir um hendan støðan heldur fram, uttan at oljuprísurin lækkar, sigur hann:

– Nú vita vit ikki, hvat framtíðin hevur at bjóða. Men heldur hendan støðan fram, er ein nýggj støða og tað mugu vit so taka upp tá.

# Kunnu onki gera fyri at hjálpa fiskiflotanum

**– Sum støðan er, hava vit ongan møguleika at hjálpa fiskiflotanum burturúr oljukreppuni, sigur Hendrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum**

FISKIFLOTI Í TRONGSTØÐU
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Tað almenna kann onki gera fyri at hjálpa feskfiskaflotanum, sum støðan er.

Tað staðfestir Hendrik Old, formaður í vinnunevndini hjá Løgtinginum.

Trupulleikin er, at oljan er metdýr og fiskaprísirnir eru lágir, so tað rennur skjótt saman ímillum endarnar.

Hann vísir ikki aftur, at vandi er til staðar fyri, at partar í flotanum kemur í svára neyð í heyst.

– Tað er so lítið, landið kann gera, tí tað eru ongi almenn avgjøld við í oljuprísinum til skipini.

Hinvegin er samgongan samd um, at vit fara ikki at lata stuðul aftur.

Formaðurin í vinnunevndini sigur, at stuðulin til rækjuvinnuna varð samtyktur var at varðveita ein rækjuflotafyri ikki at missa tey rættindi, sum vit hava fingið aðrastaðni.

Men heldur hesin oljuprísurin fram, klára skipini seg ikki, men skulu vit tosa um stuðul til feskfiskaflotan, verður talan um heilt aðrar upphæddir ennstuðulin til rækjuflotin og samgongan heldur ikki, at tað er rætt at veita stuðul.

– Stuðulin til rækjuflotan er ógvuliga avmarkaður,

Kortini vísir formaðurin í vinnunevndini á, at føroyingar eru langt ífrá teir einastu, ið gremja seg um tann høga oljuprísin.

Eisini ES- myndugleikar viðgerða tað truplu støðu, sum fiskiflotin er komin í av tí at oljan er so dýr.

Orsøkin til at teir gera tað er helst tí at teir vænta ikki, at oljuprísurin fer at lækka aftur.

Men eins og landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum, letur eisini formaðurin í vinnunevndini hurðina standa á glopp.

– Fara ES londini at veita skipunum okkurt slag av oljustuðuli, mugu vit taka støåuna upp til nýggjaviðgerð, tí tá er tað ein spurningur, hvat vit verða tvingað til fyri ikki at missa allan flotan, sigur Hendrik Old.

Heldur hendan gongdin fram koma vit í eina støðu, har vit ikki sleppa undan at viðgera nøkur viurskifti. Men, hvat hendan viðgerðin skal gangaút uppá, hevur hann onki boð uppá nú, tí so verður tað ein heilt serlig støða, sum vit kanska ongantíð hava verið í fyrr. Kortini heldur hann, at nógv skip eru so væl fyri eftir góðan fiskiskap í nøkur ár, at tey kunnu liggja í 2-3 mánaðir, uttan at fara av knóranum.

– Men fiskiflotin hevur stóra ávirkan á alt virksemi í landinum, tí verða skipini løgd, fær tað stórar avleiðingar fyri virksemið á landi og tað er so aftur ein heilt annar trupulleiki.





## Harry Potter er aftur

TÍÐINDASKRIV

Leygarmorgunin 16.juli verður enska útgávan av nýggju Harry Potter bókini at fáa kring allan heimin, og tá verður væntandi meira enn ein millión bøkur seldar. Heitið á bókini er Harry Potter and the Half-blood Prince. Sum ikki einaferð fyrr, eru tað ikki nógv fólk, sum vita hvat bókin snýr seg um. Hetta verður hildið loyniligt til bókin kemur út. Men eitt sindur hava tey á Bókasøluni rokna seg fram til.

Bókin er eitt framhald av bókini Fønixfylkingin har seinasta kapitlið í bókini, sum eitur "Annað kríggið byrjar," byrjar soleiðis: "Hann, sum ikki má nevnast við navni, er afturkomin … Í stuttari viðmerking fríggjakvøldið váttaði Gandamálaráðharrin Cornelius Fudge, at Hann Sum Ikki Má Nevnast Við Navni er komin aftur í landið og er virkin okkara millum."

"Tað harmar meg almikið at noyðast at vátta, at gandakallurin, ið nevnir seg Lord - ja, tú veitst hvønn, eg meini við - er á lívið og virkar millum okkum aftur ...

Harry fyllir 16 ár í hesari bókini, so eitt annað, sum nógv hevur verið spekulerað um er, um hann fær sín næsta koss, og um so er, frá hvørjum. Joanna Rowling hevur í einari samrøðu avdúkað, at seinastu tvær bøkurnar vera sum ein samanhangandi long bók í tveimum bindum. Tað vil siga, at tann endaligi bardagin hjá Harry ímóti myrkursins kreftum fer at byrja her. Harry fjepparar, sum duga at lesa enskt, kunnu byrja at lesa leygarmorgunin, og vit vita fyri vissu, at nógvir av teimum fáa ikki gjørt nógv annað alt vikuskiftið.

Bókasølan Í SMS letur upp kl 10.00 leygarmorgunin